# YF Lógir
## Yrkisfelag Miðnám

### Grein 1. Navn og endamál felagsins
Navn felagsins er Yrkisfelag Miðnám.
**2.** Endamál felagsins er at virka til frama fyri útbúgvingar í studentaskúlum, HF-skeiðum, handilsskúlum, fiskivinnuskúla, øðrum útbúgvingum og útbúgvingartongdum økjum á javnmettum stigi, at røkja áhugamál limanna, bæði fíggjarliga, starvsliga og fakliga.

### Grein 2. Limir
Felagið tekur upp sum lim lærara, sum hevur akademiska útbúgving á kandidatstøði og starv í studentaskúla, HF-skeiði, handilsskúla, fiskivinnuskúla, øðrum útbúgvingarstaði og útbúgvingartongdum støðum á javnmettum stigi.
**2.** Tímalærarar og ársvikarar kunnu verða tiknir upp sum limir. Í serligum føri kunnu limir eisini vera limir í øðrum fakfelag, men tá skal verða gjørd avtala millum feløgini.
**3.** Tá ið serstakar umstøður eru, kann stýrið við einmæltari samtykt á fullmannaðum stýrisfundi taka upp aðrar akademikarar sum limir, og aðalfundur skal góðkenna hetta.
**4.** Limur, sum fer í annað starv, sum ikki er innanfyri økið hjá øðrum yrkisfelag, kann halda fram sum limur.
**5.** Limur, ið verður uppsagdur orsakað av ov fáum tímum, og tímalærari, sum ikki fær endurnýggjað starv sítt, varðveitir limarættin, um hann ikki fær starv innanfyri øki hjá øðrum yrkisfelag.
**6.** Limur, sum fer í farloyvi, ella fer frá við eftirløn, kann halda fram sum limur. Hann rindar minsta limagjald og hevur ikki atkvøðurætt.

### Grein 3. Aðalfundur
Aðalfundurin er hægsta vald felagsins og verður hildin á hvørjum ári í seinasta lagi á pálsmessu. Hann verður fráboðaður við uppslagi 3 vikur frammanundan og síðani við uppslagi við fundarskrá 7 dagar undan fundinum. Samstundis verður boðað frá stýrisvali.

**2.** Skráin er:
a) At velja fundarstjóra og skrivara
b) At góðkenna skránna
c) Frágreiðing formansins til góðkenningar
d) At leggja fram grannskoðaðan roknskap til góðkenningar
e) At áseta limagjald og leggja fíggjarætlan
f) Mál frá stýri og limum
g) Grannskoðararnir kunna um uppstillingina
h) At velja tveir grannskoðarar limanna millum
i) Ymist
j) At góðkenna aðalfundarfrágreiðingina
**3.** Mál frá limunum skulu vera stýrinum skrivliga í hendi í seinasta lagi 14 dagar fyri aðalfundin. Tá ið skráin verður sligin upp, verður kunnað um innkomnu málini.
**4.** Aðalfundurin er altíð viðtøkuførur, og avgerðir verða tiknar við vanligum meiriluta.
**5.** Tá ið stýrið krevur tað, ella í seinasta lagi 1 viku aftan á, at minst 1/5 av limunum skrivliga hava kravt tað, verður kallað inn til eykaaðalfundar. Eykaaðalfundurin verður fráboðaður við uppslagi og skrá minst 3 vikur frammanundan. Hann hevur somu heimildir sum aðalfundurin og kann viðgera øll mál felagsins. Tá ið felagið er í verkfalli ella er fyri verkbanni, kann verða kallað inn til eykaaðalfundar við 3 daga freist. Sjá eisini grein 9, 2. petti.

**Grein 4. Limafundur**

Bæði stýrið og aðrir limir kunnu kalla til limafundar. Tey, ið stevna limum til fundar, gera sjálvi av, hvar fundarstaðurin skal vera, og nær fundurin verður. Hann skal vera fráboðaður við uppslagi. Allir limir hava rætt at møta.

**2.** Samtyktir á limafundi binda ikki stýrið og limafundur kann ikki úttala seg felagsins vegna.

**Grein 5. Stýrisval**

Grannskoðararnir skipa stýrisvalið, sum er loyniligt og fer fram skrivliga. Álitisfólkið gongur teimum til handa.

**2.** Hvør limur hevur 2 atkvøður.

**3.** Uppskot til valevni, ið skulu hava 2 stillarar, skulu vera grannskoðarunum í hendi í seinasta lagi á regluliga aðalfundinum. Atkvøðugreiðslan fer fram í døgunum aftan á aðalfundin, og upptalt verður 14 dagar eftir fundin. Úrslitið verður kunngjørt limunum skjótast gjørligt.

**4.** Grannskoðararnir gera atkvøðuseðlarnar. Álitisfólkini fáa atkvøðu-seðlarnar út til limirnar. Álitisfólkini savna teir inn aftur og hava eftirlit við, at bara limir atkvøða, og at hvør limur bara letur ein atkvøðuseðil. Síðan verða atkvøðuseðlarnir latnir grannskoðarunum.

**5.** Í stýrið verða valdir 5 limir og valskeiðið er 2 ár.

b. Frá regluliga aðalfundinum í 2015 og frameftir, standa 2 (2015) og 3 (2016) fyri vali. Her eftir verða valdir annaðhvørt ár tveir og annaðhvørt ár tríggir stýrislimir.

c. Í 2015 standa teir 2 sum fingu fæst atkvøður við seinasta val, fyri vali.

d. Stýrisval verður bara, um tað eru fleiri valevnir, enn tað eru stýrislimir, ið standa fyri vali.

e. Valevni, ið fær flestar atkvøður uttan at verða valt inn, er tiltakslimur. Annars verður 1 tiltakslimur valdur á aðalfundinum og valskeiðið fyri tiltakslimir er eitt ár.

g. Stendur á jøvnum, skipa grannskoðararnir fyri lutakasti at avgera raðfylgjuna á teimum valdu.

**Grein 6. Stýrið og skyldur tess**

Tá ið úrslitið av stýrisvalinum er kunngjørt, kallar fyrst valdi inn til fyrsta stýrisfundin, har stýrið skipar seg við formanni, næstformanni, skrivara og kassameistara, tó so at formaðurin skal vera í føstum starvi.

**2.** Formaðurin kallar stýrið saman til fundar, tá ið hann heldur tað vera neyðugt, ella tá ið 2 stýrislimir ynskja tað.

**3.** Stýrið er viðtøkuført, tá ið 3 stýrislimir eru á fundi, teirra millum formaður ella næstformaður.

**4.** Felagið verður bundið við undirskrift formansins. Limir felagsins verður hoyrdir, áðrenn sáttmáli verður undirskrivaður. Hetta verður gjørt við vegleiðandi atkvøðugreiðslu á limafundur.

**5.** Til at keypa og selja fasta ogn krevst aðalfundarsamtykt. Til lántøku og veðhald, sum er ikki heimilað í fíggjarætlanini, krevst aðalfundar-samtykt.

**6.** Stýrið skal virka fyri at fremja tað, ið aðalfundurin áleggur.

**7.** Stýrið skal føra gerðabók yvir stýrisfundirnar. Allir stýrislimir, sum eru á fundi, undirskriva gerðabókina.

**8.** Stýrið boðar til aðalfundur og boðar frá stýrisvali sambært grein 3.

**Grein 7. Limagjald**

Vanliga limagjaldið er ávíst prosent av føstu lønini. Umframt vanliga limagjaldið er eitt serstakt minsta gjald.

**2.** Limagjaldið verður drigið av lønini.

**3.** Lærari, sum gerst limur sambært grein 2, 1. petti, skal vanliga gjalda limagjald frá tí degi, hann hevði rætt til upptøku.

**Grein 8. At melda seg úr felagnum**

Limur, sum meldar seg úr felagnum, skal boða frá skrivliga við mánaðafreist til tann 1. í einum mánaði.

**Grein 9. At koyra lim úr felagnum**

Tá ið stýrið metir, at limur gongur ímóti felagsins samtyktum, kann hann verða koyrdur úr felagnum, um allir stýrislimir eru samdir í hesum. Boð verða givin skrivliga.

**2.** Limur, sum er koyrdur úr felagnum, kann skrivliga krevja, at málið verður avgjørt á aðalfundi. Tíðarfreistin at kæra er 2 mánaðir.

**3.** Limur, sum er koyrdur úr felagnum, kann, tá ið 1 ár er liðið, skrivliga søkja um at gerast limur aftur. Stýrið tekur avgerð.

**Grein 10. Lógarbroytingar**

Uppskot til lógarbroytingar skulu viðgerast á aðalfundi og verða síðani send til atkvøðugreiðslu millum limirnar.

**2.** Stýrið skipar fyri atkvøðugreiðsluni og ger atkvøðuseðlar. Álitisfólkini fáa atkvøðuseðlarnar út til limirnar. Álitisfólkini savna teir inn aftur og hava eftirlit við, at bara limir atkvøða, og at hvør limur bara letur eina atkvøðu. Síðan verða atkvøðuseðlarnir latnir grannskoðarunum at telja.

**3.** Uppskot eru samtykt, tá ið atkvøðurnar fyri eru í minsta lagi dupult so nógvar sum tær ímóti.

**Grein 11. At avtaka felagið**

Felagið kann verða tikið av, greiða 5/6 av limunum skrivliga atkvøðu fyri tí.

**Grein 12.**

Henda lóg kemur í gildi tann 4. mars 2014

